BØKUR BØKUR BØKUR

## Til tey sunnu

# Lætt og leskiligt




Kókibók

*Jóhanna á Tjaldrafløtti & Elisabeth Akursmørk*

Eins og í hinum bókunum ynska høvundarnir at geva tær spennandi og lættar uppskriftir til rættir, tú kanst eta við góðari samvitsku.
Bjóða til brunch ella buffet við alskyns smærri rættum, so sum brunch-pannukøkur við nøtum í siropi, sushi, grønmetismuffins, laksamousse, høsnasalat við jarðberum og eina spennandi nøtusteik við rabarbuchuteny.
Tá so tjúkku kavaflykrurnar balla kvøldini inn, kanst tú borðreiða við heitari fiskasúpan ella eina øðrvísi kjøtsúpan við góðum focacciabreyði afturvið.

## Til tey svongu

# Oddvørsa buffet-stjørnur




Kókibók

*Oddvør Skarðhamar*

Oddvørsa buffetstjørnur eru 88 uppskriftir, valdar við umhugsni, gjørdar við nærlagni, serveraðar við tokka til tær upplivingar, ið góður matur gevur.
Hesaferð hevur Oddvør Sjarðhamar valt uppskriftir til sjálvtøkuborðið, ið hon sum kunnugt er víðagitin fyri. Sætt forkelilsi.
Væl gagnist.

## Til tey krígshugaðu

# Í Waffen SS – søgan um Sverra Djurhuus




Søguligt tilfar

*Óli Olsen*

»Nú krígsins kaldi veruleiki fór at ganga upp fyri okkum, vóru fleiri, sum ynsktu seg heima aftur.=20 Men vit vóru harðliga vandir, og nú var ikki at bakka.=AB
Sverri Djurhuus (1920-2003) var ættaður úr Kollafirði, men búði í Havn. Stríðsárini var hann, har harðast leikaði á – í Waffenn SS – og mangan toygdi deyðin seg eftir honum.
Á vígvøllinum vóru eisini aðrir føroyingar. Teir verða umrøddir í høvuðspartinum: "Aðrir føroyingar í SS"

## Til tey poetisku

# Vaknandi




*Sigri Gaini*

"Vaknandi" er fjórða yrkingasavnið eftir Sigri Gaini og kanska tað vakrasta. Tekstirnir eru kenslubornir og snúgva seg í høvuðsheitum um kærleika, og hvørja ávirkan hann hevur á frásøgufólkið.

## Til tey kriminellu

# Norska løva




Krimisøga

*Jógvan Isaksen*

Færøernes Mellem- og Realskole er ein vakran dagin í mai 1935 á útferð í Lamba fyri at síggja og hoyra um útgrevsturin eftir Norsku Løvu, sum fór á land nýggjársaftan 1707. Á útferðini hvørvir ein fjúrtan ára gamal drongur, og 75 ár seinni biður beiggi drongin Hannis Martinsson um at hjálpa sær við at fáa greiðu á málinum. Hóast Hannis ikki hevur nógv álit á, at tað skal lukkast at finna fram til nakað so nógv ár seinni, tekur hann av. Brátt er hann fløktur inn í eina røð av ósvaraðum spurningum og deyða.

## Til tey klóku

# Søgan um jødarnar




Søguligt tilfar

*Sonne Smith*

Bókin byggir á útvarpssendingar hjá Sonna Smith, har hann prátaði við Hans Holm, lektara, um øll heimsins lond og fólk. Søgan um jødarnar varð endursend í 2009 og kemur nú út í bók.